# Ótu stoktan búff eftir undirskrivingina



*1. januar 2005 verða allir borgarar í Nólsoy borgarar í Tórshavnar kommunu – og heitið, Nólsoyar kommuna, verður avtikið. Seinasta mikukvøld vórðu sáttmálarnir, sum fremja sjálvbodnu samanleggingina, undirskrivaðir*

**Mikukvøldið í síðstu viku varð høvuðssáttmálin og undirsáttmálin um samanlegging millum Tórshavnar kommunu og Nólsoyar kommunu undirskrivaður í býráðssalinum í Havn. Eftir undirskrivingina ótu bý- og bygdarráðslimirnir vælsmakkandi búff í móttøkuhølunum hjá Tórshavnar kommunu**

SAMANLEGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fyrstur til undirskrivingar var undirsáttmálin, sum samráðingarnevndirnar báðar skrivaðu undir. Í samráðingarnevndini fyri Tórshavnar kommunu sótu býráðsformaðurin, Jan Christiansen og býráðslimirnir, Leivur Hansen og Heðin Mortensen. Vegna Nólsoyar kommunu sótu bygdarráðsformaðurin, Jógvan Thomsen og bygdarráðslimirnir, Jan Hansen og Leo Poulsen í samráðingarnevndini, og teir skrivaðu eisini undir undirsáttmálan.

Bert tvær undirskriftir eru undir sjálvum høvuðssáttmálanum, sum vísir til undirsáttmálan, og hesar eiga býráðsformaðurin í Havn og bygdarráðsformaðurin í Nólsoy.

Jógvan Thomsen, bygdarráðsformaður í Nólsoy, sigur, at áðrenn undirskrivingina, las Jan Christiansen upp høvuðssáttmálan. Annars tók eingin orðið við hetta høvi.

### Jógvan góðkennir

Sambært grein 4 í lógini um sjálvbodna kommunusamanlegging, skal landsstýrismaðurin í innlendismálum, Jógvan við Keldu, góðkenna sáttmálan um samanlegging. Jógvan var burturstaddur, tá ið undirskrivingin fór fram, og varð sáttmálin tí sendur innlendismálaráðnum til avgreiðslu.

Jógvan Thomsen sigur, at tá ið landsstýrismaðurin hevur sett sítt navn undir sáttmálan, er hann endaligur og kemur í gildi, 1. januar 2005.

- Undirskrivingin merkir, at samstarvið nú byrjar millum kommunurnar, sum um samanleggingin longu er framd. Vit hava valt eygleiðaraumboð í nevndirnar hjá Tórshavnar býráði, og tá ið bygdarráðsfundir verða í Nólsoy, verða eitt ella tvey umboð úr býráðnum við á hesum fundum, sigur bygdarráðsformaðurin.

### Avtøka

Við slíkari samanlegging, verður talan sjálvsagt um eina og somu kommunu. Tað merkir, at heitið, Nólsoyar kommuna, verður avtikið frá 1. januar 2005, og borgararnir í bygdini verða borgarar í Tórshavnar kommunu.

Sambært lógini um sjálvbodna samanlegging, skulu kommunurnar verða samdar um navnið, sum í hesum førinum og náttúrliga verður Tórshavnar kommuna.

Eftir undirskrivingina seinasta mikukvøld varð borðreitt við døgurða fyri býráðslimunum í Havn og bygdarráðslimunum í Nólsoy. Døgurðin, sum var vælsmakkandi stoktur búffur, varð etin í móttøkuhúsunum hjá býráðnum.

# Grundøkini verða ikki munandi dýrari

**Ein avleiðing av samanlegging kundi hugsast at verið, at grundøkini fara at gerast dýrari, og at tað tískil verður dýrari at seta búgv. – Grundøkini, sum vit nú eru í holt við at útstykkja, verða seld fyri tað, tey kosta, sigur Jógvan Thomsen, bygdarráðsformaður í Nólsoy**



*Í Nólsoy verða níggju grundøkir klár at byggja á í heyst*

SAMANLEGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nakrir fyrimunir eru og nakrir vansar eru.

Soleiðis vil tað nú einaferð vera, tá ið samanleggingar verða framdar millum kommunur. Fólkið, sum atkvøður fyri, væntar í fyrsta lagi, at fyrimunirnir verða størri enn vansarnir. Tey, sum eru ímóti – ella ivast – halda kanska, at samanleggingina kann bíða eitt sindur. Tey, ið eru fyri, grundgeva fyri síni støðutakan og tey, sum eru ímóti, grundgeva fyri síni.

Í Kollafirði frættist, at ein avleiðing av samanleggingini við Tórshavnar kommunu, er, at grundøkjaprísirnir verða nógv hægri, enn teir annars hava verið.

Sosialurin hevur spurt Jógvan Thomsen, bygdarráðsformann í Nólsoy, hvørjir prísirnir á nýggju grundøkjunum, sum kommunan nú útstykkjar, verða.

Tað er nevniliga soleiðis, at Nólsoyar kommuna arbeiðir við eini útstykking, sum í fyrsta lagi fevnir um 9 grundøki eysturi undir Brekkuni, tey rópa.

Arbeiðið er komið væl áleiðis, og skjótt verður bert bíðað eftir, at Matrikulstovan kemur út til Nólsoyar og býtir grundøkini sundur.

### Útreiðsluneutral

Jógvan Thomsen sigur, at nýggju grundøkini verða seld fyri tað, tey kosta. Tað merkir, at tey verða útreiðsluneutral fyri kommununa.

- Hetta er ein beinleiðis fylgja av lógini um siðvenju, har møguligur undirprísur merkir, at onnur noyðast at gjalda fyri tann, ið setir búgv. Tí verða grundøkini seld fyri tað, tey kosta.

Jógvan Thomsen sigur, at sambært metingini, fer kommunan at selja hesi grundøkini fyri umleið 100.000 krónur hvørt, og tá liggur kloakk og vatn til økini.

- Skulu vit selja bílig grundøkir til fólk, sum vilja seta búgv, er neyðugt, at útstykkingararbeiðið verður gjørt bíligt. Í hesum førinum liggur kostnaðurin um tær 100.000 krónurnar, sigur hann.

### Til heystar

Bygdarráðsformaðurin sigur, at útstykkingarvegurin, sum RTS, Runavíkar Transportservice, hevur gjørt, er um at verða liðugur.

- Eg vænti, at hesi grundøkini verða klár einaferð til heystar, sigur Jógvan Thomsen at enda.



# Ein filmur kann vera við til at bjarga mannlívum

**Ein filmur um bjargingarbátar hevði havt sera stóran týdning fyri trygdina á sjónum, heldur Erland Jacobsen, sum hevur siglt í yvir 50 ár**

BJARGING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Erland Jacobsen heldur, at tað, sum hevði havt størst týdning fyri at bøtt um trygdina á sjónum, hevði verið at gjørt ein film um bjargingarbátar og bjargingarútgerð. Hann minnir á, at í Føroyum eru túsundtals smábátar, hvørs eigarar ikki hava verið á trygdarskeiði*

Ein filmur um bjargingarbátar kann verða við til at bjarga mannalívum.

Tað heldur tvøramaðurin, Erland Jacobsen.

Hann hevur verið sjómaður alt sítt lív og fáur hevur so drúgvar royndir á sjónum, sum hann. Tilsamans sigldi hann í heili 53 ár, frá tí at hann var 14 ára gamalur, til hann fór frá við eftirløn, 67 ára gamal. Og sum sjómaður hevur hann tikið lut í mongum trygdarskeiðum, eins og hann hevur verið við í mongum venjingum um bjarging.

Av og á henda óhapp og vanlukkur, har smábátar eru uppi í og har tað vísir seg, at bjargingarútúgerðin av einhvørjari orsøk ikki hevur verið til ta hjálp, hon varð ætlað at vera.

– Eitt er, at teir, sum sigla við skipum, hava skyldu at vera á trygdarskeiði. Men vit eiga ikki at gloyma, at í Føroyum eru eisini túsundtals smábátar, har eigararnir ikki hava skyldu at vera á trygdarskeiði og har teir av somu orsøk heldur ikki hava verið á skeiði.

Tí ivast Erland Jacobsen heldur ikki í, at tað er ein stórur partur av teimum, sum hava smábátar, sum ikki eru nóg væl kunnugir við bjargingarútgerð.

Hann leggur kortini dent á, at hetta má og skal ikki leggjast út sum um at hann sigur, at ókunnleiki er orsøkin til tær vanlukkur og tey óhapp, sum hava verið við smábátum, tí tað veit hann einki um.

– Orsøkirnar kunnu vera so mangar, sum vit ikki kenna til.

Men hann leggur afturat, at hetta eru hendingar, sum hava ávirkað hvørt mansbarn í Føroyum. Og heldur ikki han kann lata vera við at hugsa um hesar tilburðir. Og hann heldur, at hann hevur eitt hugskot, sum kann økja munandi um trygdina á sjónum hjá teimum, sum sigla við smábátum.

### Film um bjarging

Og hann heldur, at tað kundi verið eitt frálíkt hugskot at gjørt ein film um bjarging.

– Fyri tíð síðani sóðu vit í sjónvarpinum ein mann, sum royndi at fáa ein gummibát at blása seg upp í svimjihylinum í Havn.

– Tað tók honum rættiliga langa tíð. Og tá ið tað tekur so langa tíð í einum heitum svimjihyli, har als ongar aldur eru og har maðurin kann arbeiða púra róligur í fullari vissu um, at als ongin vandi er, vísir okkum, hvussu trupul bjargingarútgerð er at hava við at gera og, hvussu neyðugt tað er við sera góðum kunnleika til hana.

– Tí eitt er at fáast við bjargingarútgerð í svimjihylinum í Havn. Men eitt er vist, og tað er, at tað er ein heilt onnur søga at fáast við útgerðina í eini neyðstøðu, har bæði kuldi og kanska eisini stormur og høgar aldur, gera seg galdandi og har menn sjálvsagt eru strongdir til tað ítarsta fyri at bjarga lívinum.

– Tá er skjótt at koma til at gera okkurt mistak og tað kann føra til tann vissa deyða, heldur Erland Jacobsen.

Tí heldur hann, at onkur skuldi tikið seg saman og gjørt ein stuttan film um bjargingarbátar.

Hetta heldur hann, hevði fingið sera stóran týdning fyri trygdina á sjónum hjá øllum teimum, sum hava smábátar.

– Í hesum filminum skuldi tað verið nágreiniliga greitt frá, hvussu ein skal bera seg at fyri at fáa ein bjargingarbát at blásast upp.

– Samstundis skuldi hesin filmurin víst nágreiniliga, hvør útgerð og, hvørjir lutir eru umborð á einum slíkum bjargingarbáti og, hvussu teir skulu brúkast.

Alt hetta heldur hann, at nógvir av teimum, sum eiga smábátar, ið veruleikanum ikki hava gjørt sær nóg greitt.

Tí heldur hann eisini, at hesin filmurin skuldi verðið vístur í sjónvarpinum regluliga, kanska eina ferð um mánaðin fyri at prenta bjargingarútgerð í høvdið á teimum, sum brúka bát.

Erland Jacobsen vísir á, at eitt nú vísti royndin í svimjihylinum, hvussu long línan var at draga, áðrenn báturin blástust upp.

– Men sendingin vísti ikki, at tað er eisini ein annar máti at blása bátin upp uppá, tí línan kann slitna, ella hon kann fløkjast.

Hann sigur, at reimarnar, sum halda hylkinum, sum halda gummibátinum saman eru skjótir at loysa, tí tað er bara at taka í teir leysu endarnar og rykkja teir av.

– So dettur hylki av bátinum og beint innanfyri har, sum línan er, er ein ringur. Verður hálva í hann, blæsist báturin upp, sigur Erland Joensen.

Hann leggur tó afturat, at hetta hevur ikki verið við í teimum trygdarskeiðum, hann hevur verið á.

– Hetta fekk eg at vita, einaferð vit vóru uppi á Gummibátatænastuni. Tað var av tilvild at eg spurdi um tað og tá fingu vit eina frágreiðing. Men á sjálvum trygdarskeiðnum, høvdu vit onki fingið at vita um hetta og tað heldur Erland Jacobsen vera sera løgið.

## Yvirlýsing frá Flokstingi Tjóðveldisfloksins í Klaksvík 26-27 marts 2004

Sjálvræði er drúgvasta tilfeingi

Flokstingið staðfestir:
• at sjálvræði er drúgvasta tilfeingi hjá føroysku tjóðini
• at við miðvísum loysingarpolitikki ber til at virðisøkja alt tilfeingi í Føroyum - bæði vinnuliga, sosialt og mentanarliga
• at Tjóðveldisflokkurin skal verja føroyska sjálvsavgerðarrættin, tryggja sosial rættindi hjá øllum samfelagsbólkum og berjast fyri at skapa eitt føroyskt vælferðarsamfelag, grundað á teir stóru møguleikar, ið eru fyri virðisøking í føroyskari vinnu

Flokstingið fegnast um, at Tjóðveldisflokkurin førir ein virknan og framrættaðan andstøðupolitikk við ítøkiligum uppskotum, ið vísa leiðina til eina frælsar Føroyar.

Flokstingið mótmælir harðliga, at høgravenda sambandssamgongan spjað ir og ræðir Føroya fólk, og at hon er farin undir miðvíst:
• at tøma føroyska sjálvræðið og lima okkum inn í danska ríkið
• at tøma føroyska vælferðarsamfelagið við at geva teimum vælbjargaðu fyrimunir, meðan verkafólkið skal bera allar byrðarnar
• at tøma alt sjálvsálit og allar hugsjónir úr føroyska samfelagnum
• og at tøma landskassan

Flokstingið er samt um, at hesi politisku mál skulu hava høga raðfesting í politikki Tjóðveldisfloksins fram móti loysing:
• framrættaður vinnupolitikkur og uppgerð við donsku kreppuloysnirnar
• sosial frambrot hjá veikastu samfelagsbólkunum
• íløgur í útbúgving og gransking
• íløgur í mentan
• umhvørvispolitikkur
• størri sjálvræði og fíggjarligt tilfeingi til kommunurnar
• økismening og útoyggjamenning

**Í Klaksvík 27. mars 2004**
**Tjóðveldisflokkurin**